# 8. mars tiltøk



## Kvinnufelagnum í Havn í Norðurlandahúsinum

Byrjað verður í forhøllini kl. 15, har Amnesty International hevur framsýning um pakistanskar kvinnur. Heiðrún og Alvi spæla violin og guitar, og møguleiki verður at fáa sær okkurt leskiligt at drekka.

Við myndum og teksti fer Kvinnufelagasamskipan Føroya at seta fokus á nakrar av okkara undangongukvinnum.

Frá 15.30 til uml. 17.30 verður orðaskifti um fosturtøku, har evnið verður lýst frá ymiskum sjónarhornum, bæði fakligum og hugsjónarligum, eitt nú tí juridiska, læknafrøðiliga, kristiliga, samfelagsliga og tí persónliga sjónarmiðinum.

Elin Winther Poulsen, tíðindakvinna, verður fundarstjóri.

Aftaná pallborðsorðaskiftið verður ein biti at eta. Borðreitt verður við góðari buffet, og hvi verður at keypa sær okkurt leskiligt afturvið matinum úr caféini.

Kostnaður fyri tiltakið um dagin er 150 kr.

Kl. 19.30 byrjr sjónleikurin Ibsens kvinnur við norsku sjónleikarakvinnuni Juni Dahr. Norðurlandahúsið selur atgongumerki undan sýningini. Kostnaður fyri leikin er 125 kr. Øll eru vælkomin.

-----

## Valkyrjurnar á Pubbini á Tvøroyri

Valkyrjurnar, sum er áhugafelag fyri kvinnur í Suðuroy, skipa altjóða Kvinnudagin 8. mars fyri áhugaverdum tiltaki í Pub & Café´ini hjá Thomsen á Tvøroyri.

Á skránni er tónleikur, fyrilestrar og ábit. Byrjað verður við sangi og guitartónum frá Rebekku Søndergaard Mortensen og einum vælkomstdrykki. Síðani fer Anna Mortensen, forkvinna í Valkyrjunum, at hugleiða um kvinnudagin og kvinnur í Suðuroynni.

Marita Rasmussen, sum er nýggjur stjóri í Vinnuhúsinum, fer at tosa um vinnumøguleikar í Suðuroy og í Føroyum sum heild. So verður matarsteðgur, har bjóðáð verða ymiskar salatir við breyði, og Rebekka syngur og spælur. Agnes Mols Mortensen, lívfrøðingur, við sergrein í tara, fer síðan at halda fyrilestur, har hon viðger samansetingina Tari, gransking og Suðuroyggin.

Susanne Høgh Olesen, sjúkrarøktafrøðingur og master í MVU, fer at tosa um kvinnur og útbúgving undir heitinum “som at spise dessert”. At enda fer Elin Mortensen, samskipari í Amnesty International, Føroya deild, at røða um harðskap móti kvinnum.

Tiltakið, sum er alment, verður í Pub & Café´ini hjá Thomsen. Byrjað verður kl. 13 til uml. 16. Kostnaðurin 100 kr. Atgongumerkir í forsølu á Pub & Café´ini hjá Thomsen, í Tangabúðini og á Statoilstøðini á Tvøroyri og í Vági.

Sí eisini heimasíðuna HYPERLINK ”http://www.valkyrjurnar.org” www.valkyrjurnar.org

## Á Bryggjuni í Vestmanna

**Altjóða kvinnudagurin verður hátíðarhildin á bryggjuni í Vestmann. Á skránni verður hipp-hopp dansur, og íverksetarin í Vestmanna, Mariann Ivansdóttir, fer at skipa fyri makeover.**

**Malan Johannesen heldur aftur í ár 8. mars-røðuna, og Laura Joensen frá Tjóðleikpalli Føroya fer at hava hugleiðingar og smærri einmansleikir.**

**Ungir vestmenningar úr ungdómshúsinum Staðið fara somuleiðis at spæla tónleik.**

**Haldið verður leygarkvøldið 8. mars kl. 20 á Bryggjuni.**




## SEV søkir eftir elektrikara, elinnleggjara ella líknandi til Sundsverkið

Á Sundsverkinum er eitt starv sum elektrikari, elinnleggjari ella líknandi leyst at søkja.

Talan er um eitt spennandi starv við góðum møguleikum fyri bæði fakligari og persónligari menning.

Tú fer at seta tíni fingramerkir á arbeiðini, ið skulu gerast.

Á deildini starvast í løtuni 3 verkfrøðingar og 4 elmontørar.

Tínar arbeiðsuppgávur verða millum annað:

- at vera við í dagliga viðlíkahaldinum av eltekniska útbúnaðinum og SRO skipanini á verkinum
- innlegging og íverksetan av el-innleggingum og stýringum.
- at verða við at finna feilir sum koma á elútbúnaðin og bøta um hesar

Tú:

- er útbúgvin elektrikari, elinnleggjari ella tilsvarandi
- dugir at arbeiða við SRO- og PLC skipanum, instrumentering og kalibrering av transmittarum
- dugir at arbeiða við stýringum og lykladiagrammum
- kennir til elinnleggingar og veitingar-anlegg (SB6)
- dugir at arbeiða við teldu á vanligum støði
- dugir at samskifta á donskum og enskum

Vit ganga út frá, at tú er fleksibul og kann arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá ið brúk er fyri tí.

Sjálvandi er tú fyrikomandi og lættur at arbeiða saman við.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og avvarðandi yrkisfelag.

Er hetta nakað, ið hevur tín áhuga, skal tú senda eina umsókn við prógvum til:

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postsmoga 319
110 Tórshavn

í seinasta lagi 26. mars 2008.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Terja Nielsen, deildar-verkfrøðing á 346800.

*SEV er grundað á eina samhaldsfasta, fólkaræðisliga skipan, har tann vinningur, sum fæst burtur úr elsøluni, verður í høvuðsheitum nýttur til framtíðar útbyggingar av framleiðslueindum og elkervinum. Á tann hátt verður vinningurin øllum Føroya fólki at gagni, og útbyggingar kunnu fara fram, so hvørt samfelagið mennist, og streymtørvurin økist.*

*SEV hevur eina veitingarskyldu, sum áleggur felagnum at veita øllum borgarum, virkjum, stovnum o.s.fr. støðugan streym alt samdøgrið. SEV hevur sostatt bæði góðsku- og kervis-ábyrgdina í Føroyum.*

*Starvsfólk hjá SEV verða útbúgvin og førleikament sambært lógarkrøvum til trygd og annað. Vitanin verður áhaldandi viðlíkahildin við bæði innanhýsis undirvísing og skeiðum og eftirútbúgvingum annars.*

*Sundsverkið er størsta elverkið í Føroyum við einum mátti uppá umleið 45MW. Á verkinum eru 5 motorar. Tveir teir størstu av hesum standa í løtuni fyri eini stórari eltekniskari dag-føring, og er tað ætlanin at tann, ið settur verður, eisini fer at seta seg inn í hesa nýggju framkomnu SRO-stýriskipan.*

*Talan er í høvuðsheitum um útskiftan av láspenningstalvum, alarmskipan, last- og spennings-regulatorum, pumpustýringum og yvirskipaðu stýriskipanina. Eisini verður onnur útgerð á Sundsverkinum tengd at somu skipan, soleiðis at tað framyvir verður ein yvirskipað stýriskipan fyri alt elverkið á Sundi.*

*Á Sundsverkinum verður annars arbeitt við Siemens S7, ABB 800xA, Profibus osv.*